# Gírig ella genial...?



rigmor@sosialurin.fo
Rigmor Dam

Mangan verður flent eftir teimum, sum liva so sparið, at tey næstan ikki unna sær lívið. Minnist gomlu grannakonuna, sum goymdi steikimargarinið á pannuni og blandaði vatn í mjólkina, sum skuldi á havragreytin.
Men kunnu vit í proppmetta, men kreppurakta vesturheiminum ikki í veruleikanum læra eitt sindur frá hesum sparna lívsstílinum, sum ofta júst er sprottin úr krepputíðum?
Hóast ráðini eru betri í dag, eru heilt vist nógvir føroyingar, sum kenna seg aftur í hesum við at spara, har tað ber til. Tað liggur djúpt inni í sálini, tí tey eru von við tað frá barni, tá tey ikki høvdu so nógv. Vit hava prátað við nakrar kvinnur, sum kenna til ein gerandisdag her á landi, har hvør teposi bleiv pressaður til síðsta dropa. Kvinnurnar liva ikki soleiðis sjálvar, men eru uppvaksnar í heimum, har sparsemi var í hásæti.



## Ein kvinna, sum vaks upp úti á bygd í 60unum, greiðir soleiðis frá:

Tað bleiv næstan onki keypt í mínum barndómsheimi. Eg minnist enn, tá eg smakkaði keypimat fyrstu ferð. Tað vóru kjøtfrikadellur úr farsi, sum ein maður koyrdi millum bygdir og seldi. Tað var sum at koma í himmiríki.

Tá eg bleiv eldri, bleiv eg viðhvørt irriterað inn á mammu og tey, og skammaðist eitt sindur. Serliga tá eg kom inn til vinfólk, har tey brúktu fleiri pengar. Men nú sum vaksin, skilji eg tað betur.

Minnist tá eg flutti niður í 70'unum. Har vóru fólk á vinstravonginum, sum livdu akkurát sum mamma og tey. Men tað var út frá einari politiskari sannføring, og ikki tí, at tað var neyðugt. Eg rokni við, at sama rákið er á veg í dag, men við støði í umhvørvinum.

Tað eru framvegis leivdir av hugburðinum hjá mammu í mær. Men ofta taki eg meg sjálva í at vera dovin, og tá endar til dømis ein plastposi lættliga í ruskílatinum. Tað er eisini nakað fascinerandi við tí lætta lívsstílinum, hetta við at hava pengar og at kunna keypa nýtt. Tí tað krevur eitt sindur av yvirskoti at hugsa um at endurnýta, til dømis at vaska posan og at heingja hann upp.

Men tað kennist gott at endurnýta og ikki at oysla. Bæði fyri samvitskuna í mun til umhvørvið, og tí pengarnir strekkja longur.

Eg haldi ikki, at mamma hugsaði so nógv um pengarnar. Tað var meira tankin um at koyra ting vekk, sum kunnu brúkast aftur ella til okkurt annað.

---

### Bøta løk

Løkini slítast á miðjuni, so tey vórðu klipt í helvt og seymað saman aftur av nýggjum umvent.

### Skifta ermurnar

Tá albogarnir vóru tunnslitnir, vórðu ermarnar tiknar av og skiftar um, so tað slitna vendi inn móti kroppinum

### Notatseðlar

Brævbjálvar vórðu kliptir sundur og brúktir at skriva á.



## Spennandi knappar

Einaferð hevði eg fylt ein skrelliposa við klæðum, sum skuldu burtur. Næstu løtuna stóð mamma við høvdinum niðri í posanum og mutlaði »Áh teir deiligu knappar!« So hon setti seg sjálvandi at spretta teir úr, áðrenn klæðini fóru vekk. Geri tað altíð sjálv nú, og eigi tí altíð eina rúgvu av spennandi knappum, sum eg kann brúka, tá eg bindi ella seymi. Tað sama við snarlásum sjálvandi..